## Rapa skal venja Neistan

Daniel Rapa er nýggjur venjari hjá kvinnuliðnum hjá Neistanum. Síðsta vetur vandi hann kvinnuliðið hjá VÍF, sum fluttu upp í Sunsetdeildina, og í 2001 og 2002 gjørdi hann hetta liðið til Føroyameistarar. Avtalan millum Daniel Rapa og Neistan fevnir um tey bæði næstu árini.



## Tórður Thomsen heldur fram

Tórður Thomsen fer eisini at verja málið hjá AB í seinnu kappingarhálvu. Tað skrivar argjamenn á heimasíðu síni. Tórður Thomsen hevur staðið millum stengurnar hjá uppflytarunum seinastu vikurnar, tí Heðin Stenberg hevur havt drúgvan skaða at drigist við. Nú er leiguavtalan við runavíkingin longd. – Eg meti, at AB er eitt felag, har tú sum leikari hevur tætt samband við nevndina. Mær dámar eisini, at øll í felagnum taka uppgávuna í álvara, sigur Tórður Thomsen við heimasíðuna hjá AB.
Avtalan er galdandi til oktober.

# Súni klárur til finalu

**Alt bendir á, at landsliðsleikarin Súni Olen, verður klárur til steypafinaluna á ólavsøku**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað hevur annars ljóðað, at tað skuldi vera ógvuliga ivasamt, um gøtumaðurin fór at koma fyri seg eftir skaðan, hann fekk í dystinum í móti EB/Streymi. Men nú sigur venjari hansara, Jógvan Martin Olsen, at teir í Víkingi rokna við Súna Olsen til steypafinaluna.
– Hann er byrjaður aftur at venja, so vit rokna við honum til steypafinaluna, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi.

### Klárur til landsdyst

Súni Olsen hevur verið plágaður av bruna undir hælinum, og hevur tískil ikki spælt fótbólt seinastu tíðina. Men nú bendir alt á, at landsliðsleikarin kann spælt finaluna á ólavsøku.
Hetta kann eisini landsliðsvenjarin Brian Kerr fegnast um, tí landsliðið skal spæla ímóti Fraklandi 12. august. Harvið hevur Súni Olsen fingið nakað av dystarvenjing aftur, áðrenn stórdystin á Tórsvølli.



Súni Olsen hevur vant seinastu dagarnar

## Formaður hartar miðlarnar

**– Tit skriva søgur, uttan at fáa tær váttaðar, sigur Andrias Lamhauge, eftir at Dimmalætting í gjár kunngjørdi, at Høgni Madsen var givin í NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Heimasíðan hjá Dimmalætting skrivaði fyrrapartin í gjár, at Høgni Madsen var givin í NSÍ. Seinni endurgav Portalurin hesa somu søgu, men í gjárkvøldið høvdu tey á Dimmalætting tikið sína søgu av heimasíðuni.
Samstundis stóð einki at lesa á heimasíðuni hjá NSÍ um hetta mál, og tískil hevur mikið tos verið um, hvat í veruleikanum er farið fram. Tískil ringdu vit á blaðnum til formannin í starvsnevndini hjá NSÍ í morgun, fyri at gera status í málinum.
– Status er, at fjølmiðlarnir skriva søgur uttan at fáa hesar váttaðar, staðfesti Andrias Lamhauge.
Hann greiddi síðani frá, at Høgni Madsen og NSÍ samráðast um framtíðar samstarv teirra, men at so leingi hesar samráðingar eru, er Høgni Madsen framvegis knýttur at NSÍ.
– Hesar samráðingar enda helst seinni í dag, legði Andrias Lamhauge aftrat.

# Neistin fær 100.000 frá H71

**Tí í apríl avdúkaði stjórin í Rainbow Seafood, at teir vildu stuðla H71 við 100.000 krónum í altjóða kapping. Men H71 fer ikki at luttaka, og tí fer stuðulin til steypavinnararnar Neistan**

HONDBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var ikki hissini stuðul, Rainbow Seafood og Regin Mikkelsen lovaðu Føroyameistarunum í H71. 100.000 krónur skuldu hoyvíkingar fáa, nú teir fyri fyrstu ferð fingu møguleikan at royna seg í altjóða kapping.
– Einasta treytin, sum vit seta, er at meistararnir fara til Europa Cup, segði Regin Mikkelsen hetta kvøldið í apríl, tá hondbóltsleikarar heiðraðu hvørjum øðrum á gallaveitslu.
Hesa treyt hevur H71 ikki uppfylgt. Teir ætla ikki at luttaka í Europa Cup og harvið fáa teir ongar pengar. Tískil fær Neistin nú latið 100.000 krónur upp í hendi – frá H71 meiri ella minni.
– Vit ynskja einans at stuðla hondbóltinum. Sjálvt um vit ikki høvdu ímyndað okkum, at H71 ikki fór at luttaka í Europa Cup, nú teir hava møguleikan til tess fyri fyrstu ferð, so høvdu vit frammanundan avgjørt, at tóku teir ikki av, fór stuðulin til steypavinnararnar, greiðir Regin Mikkelsen frá.
Neistin hevur boðað frá, at teir fara at taka lut í Europa Cup, har teir skulu til Bulgaria at takast við HC Dobrudja-Dobrich. Til hesa uppgávu hava teir nú fingið 100.000 krónur frá Rainbow Seafood.




Regin Mikkelsen handar formanninum í Hondbóltssambandinum Kristian Johansen kekkin á gallaveitslu í apríl